P/F MEST

J.C SVABOSGØTA 31
POSTBOX 65

110 TÓRSHAVN

Argir hin 27. september 2023

Málsnr.: 21/01240-43

Tykkara málsnr.:

Málsviðgeri: Suni Petersen

**Góðkenning av ætlan hjá MEST um turrdokk á Skála**

Góðkenningin hevur heimild í § 21, stk. 1 og 2 í løgtingslóg nr. 59 frá 2005 um verju av havumhvørvinum við seinni broytingum.

## 1. Heimild

Sambært § 21, stk. 1 í lógini um verju av havumhvørvinum skulu verkætlanir á sjónum og fram við strondini, sum hava týðandi ávirkan á náttúru og umhvørvi, ikki setast í verk uttan góðkenning frá landsstýrismanninum. Góðkenningar sambært § 21, stk. 1 kunnu sambært stk. 2 ikki veitast fyrr enn mett er um avleiðingarnar fyri náttúru og umhvørvi. Sambært stk. 3 kann landsstýrismaðurin taka avgerð um innihaldið í metingunum sambært stk. 2, og sambært stk. 4 kann landsstýrismaðurin taka avgerð um, hvørjar verkætlanir og virksemi skulu góðkennast sambært stk. 1. Hesar heimildir eru við skrivi frá Innlendismálaráðnum hin 12. oktober 2011 lagdar til Umhvørvisstovuna.

Umhvørvisstovan tók hin 22. mars 2023 avgerð um, at ætlanin at gera nýggja turrdokk á Skála skuldi góðkennast sambært § 21, stk. 1 í lógini, og at MEST skuldi lata gera eina umhvørvisárinsmeting, sum lýsir ávirkan av náttúru og umhvørvi av bygging og rakstri av turrdokkini. Grundgevingin fyri hesum er m.a. at ætlaða turrdokkini, umframt at fevna um øki á landi, eisini fevnir um øki á sjónum og í sjóvarmálanum, og at skipasmiðjuvirksemi er flokkað sum serliga dálkandi virksemi sambært løgtingslóg um umhvørvisvernd.

Umhvørvisárinsmetingin skuldi lýsa ávirkanina frá bæði verandi virksemi hjá MEST á Skála og virksemið í nýggju turrdokkini.

## 2. Umsókn og málsviðgerð

Umhvørvisstovan fekk hin 7. apríl 2023 uppskot til umhvørvisárinsmeting. Umhvørvisstovan hevði nakrar viðmerkingar til árinsmetingina og fekk hin 30. juni 2023 dagførda umhvørvisárinsmeting.

Umhvørvisárinsmetingin varð hin 5. juli 2023 løgd til almenna hoyring. Tá freistin at koma við viðmerkingum var úti 14. august 2023, hevði Umhvørvisstovan fingið tvær viðmerkingar.

2.1 Borgarar á Skála hava sent skriv til Runavíkar kommunu og avrit til Umhvørvisstovuna. Biðið verður um innlit í alt málið frá Runavíkar kommunu. Eisini verður biðið um, at atlit til livikor hjá fólki og virðismetingar av húsum nærhendis økinum hjá MEST verða tikin við í viðgerðina. Gjørt verður vart við, at ognirnar nærhendis ætlaðu dokkini fara at missa virðið, og kravt verður, at tey ikki fara at hava peningarligan miss av ætlaðu útbyggingini.

Umbønin um innlit er til Runavíkar kommunu, og tí ikki eitt mál fyri Umhvørvisstovuna.

Í viðgerð av góðkenningum o.ø. tekur Umhvørvisstovan atlit av livikorum hjá fólki eins og ávirkan á náttúru og umhvørvi. Men viðurskifti um virði á ognum eru ikki partur av umhvørvisárinsmetingini, ella ábyrgdarøkið hjá Umhvørvisstovuni. Tí tekur Umhvørvisstovan ikki støðu til henda spurning.

2.2 Annar borgari á Skála ger vart við, at nógvur larmur er frá virkseminum hjá MEST á Skála, av skipum o.ø. Hann ger vart við, at MEST ongar elriknar lyftur, trukkar o.a. hevur.
Eisini ger hann vart við at ampar eru frá sproytimáling, og at hann ivast í, um MEST fer at mála alt oman fyri spiksdekk við pensli ella rullu, sum sagt verður í árinsmetingini.

MEST hevur viðmerkt, at tá trukkar, lyftur o.a. skulu skiftast út, verða tey skift til elrikin tól, har tað ber til. MEST viðmerkir eisini, at sambært mannagongdum felagsins verður ikki sproytimálað oman fyri lúnning.

Umhvørvisstovan tekur viðmerkingarnar hjá MEST til eftirtektar. Eisini skal viðmerkjast, at krøv verða sett til raksturin í umhvørvisgóðkenningini, eitt nú um sproytumáling, og at tól, sum larma, skulu skiftast út við tól, sum larma minni.

Uppskot til góðkenning varð hin 11. september 2023 sent MEST og Runavíkar kommunu til hoyringar.

MEST hevði eina smávegis rætting, sum Umhvørvisstovan hevur tikið til eftirtektar.

Runavíkar kommuna hevði onga viðmerking.

## 3. Lýsing av virkseminum og umhvørvisviðurskiftum

Skipasmiðjuvirksemi hevur verið á Skála síðani 1904, tá fyrsta skipið varð tikið upp. Virksemið er útbygt gjøgnum tíðina, og í 1979 varð verandi turrdokk bygd.

Í umhvørvisárinsmetingini er verkætlanin og virksemið lýst, og mett er um ta ávirkan á náttúru og umhvørvi, sum kann væntast av ætlanini, bæði í sambandi við bygging og rakstur.

### 3.1 Verandi virksemi

Virksemið hjá MEST á Skála er á matr. nr. 110q, 216a, 222a, 222c, 223, 224b og 249 á Skála. 1. oktober 2023 yvirtekur MEST virkisbygningin, matr. 110t, ið stendur á matr. 110f. Harumframt partvíst matr. nr.: 110f og 224a.

Virksemið er ný- og umbygging, umvælingar og viðlíkahald av skipum og flótandi eindum, sum liggja við bryggju, eru tikin í dokk ella tikin upp á beding.

Talan er um bæði stál- og timburskip og aðrar flótandi eindir, t.d. fóðurflakar o.a. Maskineindir og -lutir verða umvældir umborð á skipum og á mekaniska verkstaðnum. Virksemið er harafturat tilevning og umvæling av stáleindum á landi, eins og søla av evnum og tilfari.

### 3.2 Víðkan av virkseminum

MEST ætlar at gera nýggja dokk 20 metrar norðan fyri verandi dokk á Skála. Verandi dokk er ov lítil til tey skip, sum í dag eru bygd, og tey, sum ætlandi koma, bæði í Føroyum og grannalondum okkara.

Nýggja dokkin gevur møguleikar fyri at veita tænastur til øll tey føroysku skipini, tó ikki Norrønu, samstundis sum tað fer at betra um møguleikarnar hjá MEST at bjóða seg fram í altjóða høpi.

Nýtslan á økinum er vanligt havnar-, vinnu-, smiðju- og skipasmiðjuvirksemi.

Økið er í byggisamtyktini hjá Runavíkar kommunu útlagt sum D-vinnuøki.



### 3.3 Nýggja dokkin

Nýggja dokkin verður 150 metur long, 33 metur breið og 12 metur djúp á gáttini. Dýpið minkar inn og frameftir í dokkina, so tað innast er 9 metrar. Vegur (partvís tunnil) verður gjørdur frá bryggjuøkinum og niður í dokkina. Víddin á nýggju dokkini verður 4.300 $m^2$.

Íalt skulu spreingjast góðir 60.000 $m^3$ av hellu úr dokkini, umframt at gravast skulu umleið 30.000 $m^3$ av gróttilfari úr bryggjuni, har dokkin skal vera. Samanlagt gevur gevur hettar góðar 100.000 $m^3$ av grótfyllu. Umleið 20.000 $m^3$ av grótinum skulu brúkast aftur á plássinum til verkætlanina. Eingin avtala er gjørd um restina av grótinum, men hevur Runavíkar kommuna víst áhuga fyri tilfarinum. Um MEST ikki sleppur av við tilfarið, verður tað lagt á goymslu, og skal MEST tryggja sær øll neyðug loyvi.

Út fyri innsiglingini til nýggju dokkina skal dýpast niður 12 metra dýpi. Íalt skulu umleið 1.500 $m^3$ av bleytum tilfari gravast upp av botninum, og umleið 2.500 $m^3$ av hellubotni spreingjast.

Botntilfarið út fyri nýggju dokkini er dálkað við ymiskum evnum frá virkseminum hjá MEST á Skála gjøgnum árini.

Tilfarið verður annaðhvørt latið til IRF ella aftursøkt úti á streymasjógvi. Um tilfarið skal aftursøkkjast, krevst serligt loyvi frá Umhvørvisstovuni.

### 3.4 Ávirkan á djóra- og plantulív

Økið har nýggja dokkin skal verða, verður í dag nýtt til vanligt havnarvirksemi. Fram við bryggjunum er einki serstakt djóra-, fiska- ella fuglalív. Botnurin fram við bryggjuni er týðiliga dálkaður av tí virksemi, sum hevur verið á staðnum í meiri enn 100 ár.

### 3.5 Ljóð

Óljóð er ein avbjóðing hjá nógvum vinnuvirkjum, sum eru tætt við íbúðarøki og onnur øki, har óljóð kann vera til ampa hjá teimum, sum búgva ella arbeiða har. Tí eru ásett mørk fyri, hvussu nógv virkir kunnu ávirka bústaðarøkir v.m. við larmi. Hesi mørk eru ymisk fyri ymisk tíðarskeið av samdøgrinum. Um dagin mugu fólk tola meiri larm enn um kvøldið og um náttina. Tað er ymiskt, hvussu viðkvom fólk eru fyri ljóði, men eru markvirðini fyri óljóð ásett soleiðis, at uml. 90 % av fólkinum ikki hava ampa av óljóði, sum er undir ásettu markvirðini.

Ampar av óljóði kunnu m.a. minkast við at byggja ein ljóðvegg millum ljóðkelduna og eitt nú bústaðarøki, at broyta mannagongdir og at skifta larmandi tól út við tól, sum larma minni.

Í árinsmetingini eru gjørdar simuleringar av óljóðinum frá virkseminum hjá MEST á Skála. Valdar eru nakrar arbeiðsstøðurnar, sum verða mettar at larma ringast. Tað er at trýstspula skip, at taka stál niður, at seta stál upp, at vaska skip og at mála skip. Øll hesi arbeiði kunnu gerast á verandi beding, í verandi turrdokk og nýggju turrdokkini.

Simuleringar eru gjørdar av óljóði í arbeiðsstøðum, har hesi arbeiði verða gjørd á ávikavist einum, tveimum og øllum trimum støðunum samstundis.

Simuleringarnar vísa, at stórar avbjóðingar verða av óljóði, um verandi tøkni verður brúkt til hesi arbeiði hóast ljóðveggur verður gjørdur. Men um verandi tól verða skift út til tól, sum larma minni, eitt nú elrikin tól heldur enn dieselrikin, vísa simuleringarnar, at til ber at halda markvirðini fyri larm.

## 3.6 Ljós

Ljós frá virkjum, havnarløgum o.ø. kann vera til ampa í bústaðarøkjum.

Tað er ikki ætlanin at broyta ljósskipanina á verandi anleggum. Ljóskeldurnar við nýggju dokkina verða bendar inn móti dokkini. Um ljós verður til ampa í grannalagnum, verða skermar settir á ljóskeldurnar.

Í umhvørvisgóðkenningini verða settar treytir um, at um ljós verður til ampa, skulu tiltøk setast í verk at fyribyrgja møguligum ampum.

## 3.7 Ferðsla

Í sambandi við at byggja dokkina, verður økt ferðsla, serliga ísv. at koyra grótið úr dokkini burtur av økinum. Talan verður um uml. 100.000 $m^3$ av gróti, sum skal koyrast burtur av økinum, sum svarar til einar 12.000 túrar við lastbili. Flutningurin av gróti verður mettur at taka uml. seks mánaðir, tá arbeitt verður seks dagar um vikuna frá kl. 8 til kl. 22.

## 3.8 Útlát á sjógv

Útlát á sjógv verður frá vasking os spuling av skipum á beding ella í dokk. Talan er um gjar og annan gróður, málingaleivdir, reinsievni o.a.

Flotsperra verður løgd út, tá skip verða tikin upp á beding.

Alt spillivatn frá bedingini og báðum dokkunum verður leidd til nýggja reinsiskipan. Reinsaða spillivatnið verður leitt í kommnala spillivatnsleiðing. Regnvatn úr dokkini verður pumpað á sjógv. Um vatnið er dálkað, fer tað gjøgnum reinsiskipanina áðrenn tað fer á sjógv.

## 3.9 Plastdálking

Um plastleivdir koma frá arbeiðinum við spreinging í sjónum, sum t.d. frá Nonel leidningum, verður flótisperra løgd út, fyri at forða fyri dálking av hesum plasti.

## 3.10 Umhvørvisstýring

MEST hevur mannagongdir fyri ymisk arbeiðir, eftirlitsskjøl o.a. Mannagongdirnar eru niðurskrivaðar í eini HTU handbók (Heilsa, Trygd og Umhvørvi). MEST hevur sett umhvørvissamskipara í starv at taka sær av umhvørvisviðurskiftunum á virkinum.

## 4. Avgerð

Við støði í umhvørvisárinsmetingini og øðrum samskifti við P/F MEST metir Umhvørvisstovan ikki, at sjáldsom náttúra á sjónum, á botni ella uppi á landi fer fyri skeytið, at útlát av spillivatni fer at hava skaðilig árin á fjørðin ella at roykur, óljóð ella annað fara at vera til ampa ella skaða fyri fólk ella umhvørvi á staðnum.

Umhvørvisstovan góðkennir tí ætlanina hjá P/F MEST at gera og reka nýggja turrdokk á Skála við hesum treytum.

### 4.1 Treytir

4.1.1 Góðkenningin er treytað av, at verkætlanin verður framd sum greitt er frá í umhvørvisárinsmetingini og øðrum samskifti millum Umhvørvisstovuna og P/F MEST.

4.1.2 Skal upptikið botntilfar aftursøkkjast, skal MEST í góðari tíð frammanundan søkja um serliga góðkenning sambært § 3 í kunngerð nr. 38 frá 8. mars 2001 um aftursøkking av tilfari, sum er tikið upp av havbotninum.

4.1.3 Umframt hesa góðkenning skal virksemið hjá MEST á Skála hava umhvørvis-góðkenning sambært kap. 5 í løgtingslóg um umhvørvisvernd.
Í umhvørvisgóðkenningini verða settar treytir til virksemið, eitt nú um spillivatn, óljóð, ljós, um skráseting, innaneftirlit o.a.

4.1.4 Henda góðkenning tekur ikki støðu til aðrar møguligar góðkenningar ella loyvi sambært aðrari lóggávu.

## 5. Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 24 í løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg kærast til landsstýriskvinnuna í umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðan sendir hana til Umhvørvismáláráðið við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er fýra vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Møgulig kæra skal vera Umhvørvisstovuni í hendi í seinasta lagi 24. oktober 2023

Sigga Jacobsen, deildarleiðari / Suni Petersen, málsviðgeri